## Sólvá fer til Luxemburg

Ein føroyskur flogbóltsspælari skal næsta árið luttaka í landskappingini í Luxsemburg. Suðurrás veit at siga, at 19 ára gamla Sólvá Dimon av Tvøroyri hevur gjørt avtalu við felag í bestu flogbóltsdeildini í Luxsemburg. Avtalan kom í lag, tá ið EM undankappingin varð hildin í Føroyum í mai mánaði í ár. Felagið eitur VBAmberlenster, sum í fjør vann sær pláss í bestu kvinnudeildini í Luxsemburg. Fyrsta avbjóðingin hjá Sólvá Dimon verður næsta vikuskifti, tá liðið skal luttaka í kapping í Suðurtýsklandi. Fyrsta umfarið í landskappingini verður síðst í september, og hildið verður fram í landskappingini inntil síðst í apríl, skrivar Suðurrás á heimasíðu síni sudurras.com.




## Tríggir íslendingar á All-Star

Seks av teimum, sum spældu mansfinaluna í hondbólti, vórðu valdir á olympiska All-Star liðið hjá altjóða hondbóltssambandinum, IHF. Grannar okkara fyri eystan hava heilar tríggjar spælarar við á All-Star-liðnum. Teir eru Snorri Steinn Guðjónsson, Guðjón Valur Sigurðsson og so livandi legendan, Ólafur Stefánson. Teir tríggir fronsku spælarnir, sum eru valdir, eru málverjin, Thierry Omeyer, strikuspælarin, Bertrand Gille, og so stórskjúttin hjá Fraklandi, Daniel Narcisse. Sjeyndi maðurin á All-Star liðnum, er spanski vongurin, Albert Rocas.

KÍ-HB 0-0

# Linligur føðingar-dagur

**Á 104 ára føðingardegnum hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag fingu áskoðararnir við Injector Arena onga stórvegis uppliving, tá føroysku fótbóltsrisarnir hittust. Nógvi vindurin fekk stóra ávirkan, og møguleikarnir vóru fáir í tali**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

*KÍ*

*HB*

Klaksvíkingar høvdu lítið at frøast um í gjár. Í nógva vindinum og kuldanum á Injetcor Arena sóu teir seg gjarna fáa øll stigini. Fótbóltsspælið var í stórum løtum út av lagi í málleysa javnleikinum. Stutt sagt, so var talan ikki um nakra stóra uppliving á 104 ára føðingardegnum hjá Klaksvíkingar Ítróttarfelag.

Gomlu risarnir í føroyskum fótbólti líktust tí, sum teir seinnu árini eru vornir. Tvey lið, sum ikki megna tað, sum fjepparar, fótbóltsáhugaði og ikki minst feløgini sjálvi vænta og vóna. Klassikarin var ikki serliga væl leiktur, har serliga nógvi vindurin fekk stóra ávirkan. Hóast klaksvíkingar fóru vónbrotnir til hús, so er veruleikin, at teir vunnu eitt kærkomið stig í botnstríðnum.

### Rodrigo stóð seg væl

Størsta og kanska mest óvæntaða broytingin í KÍ-hópinum var, at Eyðun Klakstein, høvuðsvenjari, ikki stóð á síðulinjuni. Hann var leikbannaður, og tí stóð Trygvi Mortensen, hjálparavenjari, á odda fyri klaksvíkingum hendan dagin. Og hann kundi fyrstu løtuna gleðast um væl upplagda Rodrigo Silva, sum var framherji í vinstru. Pætur Jørgensen, sum var vongverji í høgru, hevði stórar trupulleikar av brasiliumanninum í fyrra hálvleiki, og áðrenn umfarið var hálvrunnið, hevði hann gjørt trý fríspark móti honum.

Dysturin hevði ikki tað stóra at bjóða. Grundleggjandi manglaði hugflog og gjøgnumbrot í framrættaða spælinum, har liðini royndu at leggja nógv fyri. Í verjustøðu stóðu bæði væl. Tað eydnaðist hvørgum at trýsta mótstøðuliðið, og sum dysturin leið gjørdist alt heldur tilvildarligt.



*Skipaða spælið sást ikki so nógv til, tá KÍ helt føðingardag á heimavølli móti HB*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Vøllurin

Tað er eyðvitað, at graslíkivallirnir við gummileydum taka ferðina av spælinum. Tað var næstan syrgiligt at síggja í gjár, at bólturin skuldi sendast upp frá fyri at fáa ferð á hann. Tað loysti seg oftast væl betri, tíverri.

Dagfinn Olsen dømdi dystin á Injetcor Arena, og tað gjørdi hann fyrimyndarligt. Fingur kann ikki setast á nakra avgerð, og hann loysti allar ivastøður í samráð við leikararnar. Flott.

### KÍ vísti tenn

Seinni hálvleikur var heldur frægari. Hann øtlaði vindin, og tað gav KÍ lítlan fyrimun, sum hevði vindin undan. HB søkti at málinum fyrstu minuttirnar eftir hvíldina, og Milan Kulic, Hendrik Rubeksen og Rókur av Fløtum Jespersen vóru tætt við. Vandamestu royndina átti Rógvi Jacobsen, tá hann hegnisliga legði bóltin niður, áðrenn hann smekkaði til úr 20 metrum. Marcin Dawid fekk vart fyri skotroyndini. KÍ vísti tenn seinastu løtuna, men teir vóru ongantíð nær við at fáa avgerandi málið.

Andrew av Fløtum stóð seg væl sum framherji hjá HB. Fyrrverandi landsliðsleikarin dugdi væl at halda bóltinum og sleppa sær skilagott av við hann. Saman við Róki av Fløtum Jespersen var hann mest eyðsýndur á HB-liðnum.

KÍ vann sær hóast alt eitt kærkomið stig í gjár. Bæði Skála og B71 taptu sínar dystir, og fjarstøðan til niðurflytingarstrikuna er nú trý stig. HB stríðist framvegis fyri heiðursmerkjum, og mátti síggja Víking fara fram um á stigatalvuni.

## Hetta var stórur lætti

Lagið í NSÍ leguni var ógvuliga gott, eftir at full úrtøka var vunnin burtur úr grannauppgerðini. NSÍ skifti formann fríggjakvøldið, tá ið Andrias Lamhauge, sum eisini var formaður í 2005 og 2006, aftur tók um stýrisvølin, og onkrir skemtaðu við, at sigurin var fyrsta úrslitið av formanseffektini!

- Vit eru nøgdir við avrikið og serliga, at vit hesa ferð vóru so fokuseraðir og megnaðu at halda tætt í verjupartinum. Tað skulu vit halda fram við. Vit hugsa ikki so nógv um, hvør endastøðan verður. Nú ræður um at taka eina avbjóðing í senn og at greiða hana til fulnar. So fæst at síggja seinni í heyst, hvør endastøðan verður, var skilagóða NSÍ staðfestingin eftir fyrsta sigurin, síðani 10. juli, tá ið HB varð sent úr Runavík við 1-0 tapi.

-jh

## Toftamenn iðraðu seg

Tríggir dystir síðani summarsteðgin og tríggir sigrar. Tað var úrtøkan hjá B68, tá ið teir fóru undir grannauppgerðina á Svangaskarði. Eftir 1-0 tapið var lætt at gera niðurstøðuna:

-Tað er ongantíð hugaligt at tapa og als ikki fyri grannunum. Eftir tepra heimasigurin á B36 vónaðu vit, at óhepna gongdin á heimavølli var vend, men nú mugu vit enn eina ferð staðfesta tølini, sum siga, at tað í ár hevur hilnast heilt illa á heimavølli, var viðmerkingin frá heimaliðnum.

Tá ið B68 heimaskansin ikki vísir seg at vera tann, sum hann hevur verið, so er tað kanska ikki verri hjá toftamonnum, at teir tvær tær næstu ferðirnar skulu spæla á útivølli – fyrst í Gøtu og síðani í Streymnesi!

-jh